## Súni er víkingur

Víkingur og Súni Olsen skrivaðu leygardagin undir eitt ára samstarvsavtalu. Tað hevur leingi ligið á ljóði, og leygardagin varð tað staðfest. Stutt undan dystinum í Sarpugerði millum Víking og KÍ er tað á samkomu í ítróttarhúsinum í Leirvík vorðið alment, at Súni Olsen fer at spæla við Víkingi. Sáttmálin er galdandi fyri næsta kappingarár.



## Kreppan rakar fótbólti

Alheims fíggjarkreppan fer eisini at raka fótbóltsheimin, heldur Allan K. Pedersen, sum eigur danska felagið FC Nordsjælland. - Tað verður truplari at fáa hendur á pengum til feløgini, tí øll hugsa seg væl um, áðrenn tey nú brúka pengar. Gongdin hevur eisini við sær, at vit mugu hugsa okkum serliga væl um, hvat vit brúka okkara pengar til, sigur Allan K. Pedersen við Ekstrablaðið.

# Fótbóltsárið í myndum



*Arnbjørn Hansen hevur skorað, og so hevur EB/Streymur tikið fyrsta stóra stigið móti greipuni*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*



*Toftamenn vóru framúr í seinnu hálvu. Eitt nú vunnu teir trupla útidystin móti Víkingi í Gøtu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Skála lá leingi í tungum sjógvi, og tá teir taptu heimadystin móti B68, varð niðurflytingin staðfest*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Víkingarnir høvdu veruliga takið á NSÍ í ár. Níggju stig gjørdist tað til í teimum trimum dystunum móti nú fyrrverandi meistarunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Tá KÍ tapti útidystin móti Skála í øðrum umfarinum, var hetta fyrsta tekinið um eitt kappingarár, har KÍ fyri tað nógva stóð við rygginum móti múrinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*